# Smyril hevði sinniliga yvirskotið

**Eftir vónbrotið næstsíðsta leygardag vístu vágbingar í Kollafirði, at teir framvegis eiga bestu manningina umborð á 6–mannaførunum**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*


*Eftir ósigurin á fjarðastevnu lótu vágbingarnir á Smyrli ongan iva vera um úrslitið í Kollafirði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Undan leygardegnum vóru tveir áhugaverdir spurningar í sambandi við kappingina millum 6-mannaførini við monnum. Annar var, um vágbingarnir umborð á Smyrli nú høvdu mist tamarhaldið á hesi kappingini, sum teir í eitt ár og fram til kappingina á Fjarðastevnuni høvdu havt tamarhald á. Hin spurningurin var, um klaksvíkingar eftir sigurin á Fjarðastevnuni nú aftur høvdu fingið eina manning, sum tað kundi roknast við fór at kappast um fremsta plássið.

Svarini upp á báðar spurningarnar vóru í Kollafirði nei. Úrslitið vísti, at Smyril avgjørt ikki hevur mist tamarhaldið á hesi kappingini, og úrslitið vísti eisini staðiliga, at klaksvíkingar ikki kunnu roknast millum favorittarnar.

Páll Fangi legði annars væl fyri. Teir tóktust ætla sær sama taktikkin, sum teir høvdu so góða eydnu við á Skálafjørðinum. Ta ferðina var Páll Fangi fremstur so at siga allan vegin. Hesa ferð var hann fremstur fyrstu fimm hundrað metrarnar. So legði Jarnbardur seg upp á síðuna av honum, og tá ið málið var hálva rógvið, legði Smyril framat. Vágbingar løgdu seg á odda, og teir vóru sannførandi. Teir fóru fyrstir undir endaspurtin, og tá stóð eingin teimum kurl.

Fyri teir umborð á Páll Fanga kendist tað sum vónbrot, at tað umframt Smyril eisini eydnaðist bæði Jarnbardi og Stráluni at vinna á teimum. Hetta var ikki tað, sum teir høvdu vónað, tá ið teir leygarmorgunin fóru úr Klaksvík og vestur til Kollafirðar.

– Vit kundu takka okkum sjálvum fyri, at tað ikki royndist so væl á Skálafjørðinum. Vit vóru stutt sagt ikki nóg væl uppsettir. Undan Sundalagsstevnuni høvdu vit arbeitt nógv við at seta okkum upp til kappingina. Vit vóru væl fyri, og vit eru fegnir um, at tað aftur eydnaðist at vinna, siga teir umborð á Smyrli.

Leygardagin fer Smyril á Jóansøku at verja kappróðraræruna hjá suðuroyingum. Um tað verða klaksvíkingar, strandingar ella teir umborð á Jarnbardi úr høvuðsstaðnum, sum fara at bjóða av, er meiri ivasamt, men avrikið og úrslitið í Kollafirði bar lítlar ábendingar við sær um, at tað skal eydnast hjá nøkrum at gera av við teir umborð á Smyrli – um tað aftur fer at eydnast hjá teimum at vinna yvir sær sjálvum.

# Hetta høvdu teir ikki roknað við

**Hóast Argjabáturin av øllum alvi enn eina ferð royndi at gera ein vørr, so var triði sigurin hjá Ørvi ongantíð hóttur**

8–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*


*Ørvur gongur væl í startspurtinum, og hann gongur framúr væl í tí, sum onkrir plaga at rópa miðróðrinum. Talan er um stórar og sterkar rógvarar. Tá ið teir seta á munar tað av álvara*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Teir høvdu ikki roknað við, at tað skuldi ganga so mikið væl. Men tølini lúgva ikki. Tað er ein veruleiki, at mest sannførandi kappróðrarmanningin higartil í ár hevur verið tann umborð á 8–mannafarinum hjá Havnar Róðrarfelag. Ørvur fór í Klaksvík, á Strondum og aftur í Kollafirði leygardagin sum ein pílur frammanfyri kappingarneytarnar. Í fyrstu tøkunum hava teir fingið hann framum hinar, og so hevur yvirhøvur eingin ivi verið um fremsta plássið. Heldur hevur spurningurin verið, hvussu sannførandi sigurin hjá Ørvi hevur skula verið.

Undanfarnu ferðirnar hava Kvívíkingur og Argjabáturin kappast um næstfremsta plássið. Í Kollafirði var talan ikki um nakra serliga kapping um annað plássið. Kvívíkingar fylgdi við fyrstu hundrað metrarnar og kanska væl tað, men so tóktist tað ikki vera meiri í teimum, og tá ið av tornaði hevði Kvívíkingurin tapt fyri Ørvi, Argjabátinum og eisini Knørri, sum sammett við í fjør hevur nýggja manning. Bara ein av teimum umborð á Knørri var eisini við í fjør.

Munurin frá Ørvi og aftur til Kvívíkingin var sekstan sekund.

Lotið var ímóti í Kollafirði, og tað tóktist ikki hóva Kvívíkinginum.

Argjabáturin hevði framt onkrar justeringar, síðani tað varð róð á Skálafjørðinum. Eitt nú høvdu teir fingið ein meiri royndan kappróðrarmann at sita við stýrisvølin. Argjabáturin hekk uppi í Ørvi fyrsta lítla triðingin at teininum, men tá ið bátarnir komu á túsund metra málið, var Ørvur leysur, og so hefti tað ikki. Á málinum var munurin meiri enn tvær bátslongdir.

Ørvur gongur væl í startspurtinum, og hann gongur framúr væl í tí, sum onkrir plaga at rópa miðróðrinum. Talan er um stórar og sterkar rógvarar. Tá ið teir seta á munar tað av álvara.

– Vit høvdu ikki droymt um, at tað skuldi hilnast so væl í ár, sum tað hevur gjørt higartil. Vit fara at royna at halda fram, sum vit hava gjørt í undanfarnu kappingunum, men vit vita væl, at tað er neyðugt, at alt gongur, sum tað skal, um vit framvegis skulu vinna. Argjabáturin hevur góða manning, og tíðirnar hjá teimum eru góðar. Men higartil hevur tað hilnast heilt framúr hjá okkum, er viðmerkingin hjá bátsformanninum á Ørvi, Halgir Dahl-Olsen.

Ørvur var FM vinnari í 1999. Tað skal vilja heilt illa til, um 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag ikki aftur í ár fer at vinna gull. Um avrikini og úrslitini í trimum teimum fyrstu kappingunum verða brúkt sum metingargrundarlag, so er lítið at ivast í, at FM heitið verður tryggjað undan ólavsøkuni og kanska longu, tá ið fimm av teimum sjey FM kappingunum eru farnar afturum.

# 22 persónlig met

**Oyggjaleikaskjúttarnir royndu seg leygardagin í stuðulskapping á Tórsvølli**

ÍTRÓTTARTÍÐINDI
*Bogaskjóting*

Bogaskjótideildin skipaði leygardagin fyri stuðulsskjótikapping á Tórsvølli í Havn, har bogaskjúttarnir, sum manna Oyggjaleikaliðini skuldu royna seg í einum FITA-umfari fyri at savna inn pening til leikirnar á Guernsey um eina viku.

Undan kappingini hava skjúttarnir verið hjá fyritøkum og øðrum stuðlum, og samlaði úrslitið var gott — bæði fíggjarliga og í skjótingini.

Ikki færri enn 22 persónlig met blivu sett, og eitt úrlit var tangering av persónligum meti.

Úrslitið í recurve var, at Rógvi Mohr vann við (243P+262P+264+319P) 1088P stigum, nr. 2 var Rói Johannesen við (210+255+271P+313) 1049 stigum og nr. 3 var Hans Jørn Nielsen við (248P+238+233+308) 1027 stigum.

Unga Annika Vang var nr. 6 í kappingini við 4 persónligum metum (198P+230P+198P+249) 875P stigum.

Hjálparvenjarin luttók eisini og setti hann persónligt met á 90 metrum við 226 stigum.

Úrslitið í compound var, at Schandorff Vang vann við (306+326+327+353P) 1312 stigum, nr. 2 Jóannes Poulsen við (313P+323P+306+341) 1283P stigum og nr. 3 var Per Holm Andersen við (291+321+325+339) 1276 stigum.

Anders Jønnson, sum eisini er á OyL-liðnum setti persónligt met á 90 metrum við 279 stigum og tangeraði sítt met á 70 metrum við 308 stigum.

Hægsta stigatal í hvørjum umfari er 360 stig.

**ÍSB-skjútti góð úrslit**

Martin Karl Olsen, Tambar, er ein av okkara nýggju skjúttum, sum hevur gjørt sera stór framstig í vetur og gongur javnt framá. Hann skal luttaka til HM fyri rørslutarnaði í Madrid í september og hevur tí verið við í venjingum og kappingum saman við OyL-skjúttunum.

Síðan fyrstu kapping í apríl mánað hevur hann betra um úrslit síni við meiri enn 100 stigum og setti hann leygardagin 5 persónlig met - á øllum frástøðum og samanlagt – við (289P+317P+297P+335P) 1238P stigum.

Bogaskjótideildin takkar øllum stuðlum.



# Eysturoyingurin hevur gott tak á

**Sigurin í Kollafirði var eins sannførandi, sum hann var á Skálafjørðinum. Nólsoyingurin tykist vera besta boðið upp á hóttan ímóti gula bátinum, meðan Havnarbáturin eftir sigurin í Klaksvík er dottin longri aftur og hesa ferð varð aftastur**

10–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*


*Frøðin var sjálvandi stór umborð á Eysturoyinginum, tá teir annan róðurin á rað fingu sjey stig fyri fremsta plássið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er synd at siga, at broytingarnar eru serliga stórar í kappingini millum 10–mannaførini. Í hvussu so er ikki, tá ið talan er um kappingina um fremsta plássið. Síðani startskotið næstsíðsta leygardag varð latið av undir Rókalandinum á Skálafjørðinum fyri 10–mannaførunum á Fjarðastevnuni, hevur Eysturoyingurin verið fremstur. Hann vann trygt á Skálafjørðinum, og hann var aftur sannførandi, tá ið tað leygardagin varð kappast á Kollafirði.

– Vit fingu góðan start, og tað var skjótt, at vit vóru frammanfyri hinar. Tað kennist léttari, tá ið tú ert fremstur, og soleiðis var tað eisini hesa ferð, siga teir umborð á Eysturoyingi.

Lotið var ikki sørt ímóti, men hetta tóktist ikki at nerva teir umborð á Eysturoyingi. Teir róðu stútt og støðugt, og tá ið bátarnir fóru um 1500 metra málið, var munurin aftur til Nólsoyingin ein knøpp bátslongd. Onkra løtuna tóktist tað sum um, at teir umborð á Nólsoyinginum høvdu hug at toga seg eitt sindur inn á oddabátin, men so tóku teir umborð á Eysturoyinginum nøkur rimmar eyka tøk, og harvið staðfestu teir sannførandi oddasessin.

**Tvær kappingar**

Havnarbáturin tóktist fáa betri start, enn hann fekk á Fjarðastevnuni. Men teir umborð á Havnarbátinum megnaðu ikki at halda tørn, og sum tað leið, so gjørdist talan so at siga um tvær kappingar. Nólsoyingurin hekk uppi í Eysturoyinginum, meðan Havnarbáturin og Vestmenningurin kappaðust um ikki at gerast aftastur.

Vestmenningur fekk – sær sjálvum líkur – ikki besta startin, men hann kom seg skjótt, og eina lítla løtu tóktist tað sum um, at hann skuldi bjóða oddabátunum av. Men á túsund metra málinum var munurin øktur.

Havnarbáturin megnaði ikki at hótta Vestmenningin, og síðani glæsiliga sigurin á Norðoyastevnu er Havnarbáturin nú dottin niður á aftasta plássið.

Nólsoyingurin hevði hug at taka seg fram á Eysturoyingin í seinna partinum av kappingini. Men Eysturoyingurin fór fyrri undir endaspurtin, og hann avvísti allari kapping um fremsta plássið.

Men Nólsoyingurin tykist knáur, og út frá gongdini á Kollafirði kann ikki roknast við øðrum enn, at um nakar skal hótta Eysturoyingin komandi vikuskiftini, so skal tað vera Nólsoyingurin. Um tað fer at eydnast er ein heilt onnur søga.

## FM-støðan

**Eftir róðurin í Kollafirði er samlaða støðan í FM-kappingini hendan**

| 5-mannafør, dreingir sundalagsst. | Stig | íalt |
|---|---|---|
| 1 Sílið | 21 | 7 |
| 2 Havfrúgvin | 14 | 5 |
| 3 Blikur | 12 | 4 |
| 4 Tjaldrið | 10 | 3 |
| 5 Fípan Fagra | 5 | 2 |
| 6 Royndin Fríða | 4 | 1 |
| 7 Kollur | 0 | 0 |
| 8 Junkarin | 0 | 0 |
| 9 Báran | 0 | 0 |

| 6-mannafør, kvinnur | | |
|---|---|---|
| 1 Gongurólvur | 21 | 7 |
| 2 Páll Fangi | 14 | 4 |
| 3 Lómur | 11 | 3 |
| 4 Smyril | 6 | 0 |
| 5 Jarnbardur | 5 | 5 |
| 6 Fortuna | 5 | 1 |
| 7 Fuglfirðingur | 4 | 2 |

| 5-mannafør, gentur | | |
|---|---|---|
| 1 Blikur | 19 | 7 |
| 2 Sílið | 14 | 4 |
| 3 Havfrúgvin | 13 | 5 |
| 4 Drekin | 11 | 3 |
| 5 Firvaldur | 4 | 1 |
| 6 Ørnin | 3 | 0 |
| 7 Fípan Fagra | 2 | 2 |
| 8 Junkarin | 0 | 0 |
| 9 Hulda | 0 | 0 |
| 10 Kollur | 0 | 0 |
| 11 Tjaldrið | 0 | 0 |

| 6-mannafør, menn | | |
|---|---|---|
| 1 Smyril | 19 | 7 |
| 2 Jarnbardur | 14 | 5 |
| 3 Strálan | 11 | 4 |
| 4 Páll Fangi | 10 | 3 |
| 5 Lómur | 5 | 0 |
| 6 Gongurólvur | 3 | 2 |
| 7 Sundabáturin | 2 | 1 |
| 8 Sølmundur | 2 | 0 |
| 9 Kollfirðingur | 0 | 0 |

| 8-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 Ørvur | 21 | 7 |
| 2 Argjabáturin | 15 | 5 |
| 3 Kvívíkingur | 11 | 3 |
| 4 Knørrur | 10 | 4 |
| 5 Teistin | 6 | 2 |
| 6 Toftabáturin | 3 | 1 |
| 7 Gullbrandur | 0 | 0 |

| 10-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 Eysturoyingur | 19 | 7 |
| 2 Nólsoyingurin | 14 | 5 |
| 3 Havnarbáturin | 14 | 3 |
| 4 Vestmenningur | 10 | 4 |

## Úrslitini

**Úrslitini á sundalagsstevnuni í Kollafirði um vikuskiftið vóru hesi**

| 5-mannafør, dreingir | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5:16:07 |
| 2 | Havfrúgvin | 5:19:11 |
| 3 | Blikur | 5:26:09 |
| 4 | Tjaldrið | 5:27:07 |
| 5 | Fípan Fagra | 5:37:22 |
| 6 | Royndin Fríða | 5:38:00 |
| 7 | Junkarin | 5:40:16 |
| 8 | Kollur | 5:48:01 |
| 9 | Báran | 6:02:13 |

| 6-mannafør, kvinnur | | |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 5:34:23 |
| 2 | Jarnbardur | 5:38:02 |
| 3 | Páll Fangi | 5:38:15 |
| 4 | Lómur | 5:42:00 |
| 5 | Fuglfirðingur | 6:08:20 |
| 6 | Fortuna | 6:16:18 |
| 7 | Smyril | 7:07:14 |

| 5-mannafør, gentur | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 5:38:04 |
| 2 | Havfrúgvin | 5:40:18 |
| 3 | Sílið | 5:40:21 |
| 4 | Drekin | 5:48:15 |
| 5 | Fípan Fagra | 5:48:18 |
| 6 | Firvaldur | 5:55:00 |
| 7 | Junkarin | 5:56:07 |
| 8 | Ørnin | 5:56:24 |
| 9 | Kollur | 6:16:18 |
| 10 | Hulda | 6:23:20 |
| 11 | Tjaldrið | 6:37:18 |

| 6-mannafør, menn | | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 7.47.13 |
| 2 | Jarnbardur | 7.51.00 |
| 3 | Strálan | 7.52.24 |
| 4 | Páll Fangi | 7.54.07 |
| 5 | Gongurólvur | 7.54.18 |
| 6 | Sundabáturin | 7.59.02 |
| 7 | Lómur | 8.00.00 |
| 8 | Sølmundur | 8.09.02 |
| 9 | Riddarin | 8.11.07 |
| 10 | Kollfirðingur | 8.14.10 |
| 11 | Snopprikkur | 8.22.13 |
| 12 | Fortuna | 8.43.16 |

| 8-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 7:20:14 |
| 2 | Argjabáturin | 7:25:19 |
| 3 | Knørrur | 7:29:15 |
| 4 | Kvívíkingur | 7:36:01 |
| 5 | Teistin | 7:58:08 |
| 6 | Toftabáturin | 7:58:15 |

| 10-mannafør | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 9:30:01 |
| 2 | Nólsoyingurin | 9:31:18 |
| 3 | Vestmenningur | 9:36:19 |
| 4 | Havnarbáturin | 9:40:13 |

## Landsliðsúttøka

Lars Nedergaard hevur í fyrstu atløgu úttikið 29 leikarar til bruttohópin hjá landsliðnum. Millum hesar eru fimm útisetar, men eisini nøvn, sum ikki hava verið so nær landsliðnum áður teljast á listanum, og spennandi verður at vita, hvørt onkur av hesum verður førur fyri at bíta seg veruliga fastan

**Hópurin er hesin:**

| Málverjar: | |
|---|---|
| Johan Danielsen | Kyndil |
| Eli Müller | VÍF |
| la Christian Djurhuus | KÍF |
| Levi Nybo | H 71 |
| Lars L. Black | Kyndil |

| **Útileikarar:** | |
|---|---|
| Halgir Dahl-Olsen | H 71 |
| Áki Olsen | VÍF |
| Bárður Brimvík | H 71 |
| Mortan Hansen | Tjaldur |
| Janus Einar Sørensen | Kyndil |
| Ingi Olsen | VÍF |
| Hans Áki Dahl-Christiansen | Kyndil |
| Kristjan Madsen | KÍF |
| Regin Petersen | KÍF |
| John Zachariasen | VÍF |
| Sveinur Justinussen | St.ÍF |
| Áki Mørk | Neistin |
| Áki G. Olsen | VÍF |
| Høgni Klein | Kyndil |
| Ragnar Stakksund | Neistin |
| Alexandur Johansen | St.ÍF |
| Sámal Joensen | VÍF |
| Heini Bendtsen | Kyndil |
| Pauli Hansen | St.ÍF |

| Útisetar | |
|---|---|
| Jens á Skipagøtu | Team Amager |
| Heini H. Joensen | Team Midtsjælland |
| Martin Hummeland | Ajax |
| Tróndur Joensen | Team Amager |
| Marius Joensen | IF Stadion |